## TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evnið: Hin góði hirðin, kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni. Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini Møti, har Øssur Berghamar talar. www.hebron.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Marcelin Rediu, prestur í Mariukirkjuni. Kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Elisabeth Mortensen um evnið: »Náði Guds í lívi Hannu« og á tilbiðjarnarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um evnið: Bíblian, tónleikur og samkoman – annar partur«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn og bíbiltími har Jógvan Z. undirvísir um Opinberingina. www.livdin.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti við Jústines Poulsen.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Leygardag kl. 20 Møti í Kollafirði major Njál Djurhuus talar.
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 17 Smáskótamøti, kl. 19 stórir skótar.

**Meinigheitshúsið**
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Sam Jakobsen, evnið: Hví doyði Jesus.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, evnið: Rættvísgjørd í Kristusi 1. partur, talari: Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Samkoman Rhema**
Fríggjakvøldið **verður einki** JC-Teens.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Tummas J. Askham.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikudagin kl. 7 Bønarmøti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
22. februar Møti v/ Petur F. Johannesen, Skála.

**Missiónsvika í skúlanum í Kaldbak**
Í kvøld kl. 20 talar Niels Jacob Nielsen, trúboðari, Gullak endar. Sangur: Jónhilda og Gullak.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Regin Olsen, Mourits Mouritsen endar. Sangur: Meinigheitskórið í Havn.
Sunnudagin kl. 15 Sunnudagsskúli, kl. 18 talar Alfred Petersen. Sangur: Manskórið í Havn. Bønarmøti verður øll kvøldini hálvan tíma áðrenn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Kollafjørður**
Leygardagin kl. 20 hevur Frelsunarherurin møti í Missiónshúsinum í Kollafirði, major Njál Djurhuus talar. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin verður morgunmøti við breyðbróting og dópi kl. 11 við Eiler Johannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin. Mánakvøldið opið hús fyri ung kl. 20.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jóhan P. Jóhannesen, Rasmus og Jóhan P. syngja. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor og kl. 18 Møti.

Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30.
Tim 5 verður mánadagin kl. 17.30 og Ungdómsmøti kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 18 Bønarløta.
Leygarkvøldið kl. 18 Bønarløta.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Einki møti. Vælkomin í Betania.

**Betesda í Norðoyggjum**
Kl. 11 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Yngra kvartettin skipar fyri evangeliska fundinum við góðum felagssongi, kórsongi og kvartett.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Leygarkvøldið kl. 23 Ungdómskvøld. Ung úr Hoyvík luttaka.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við luttøku úr Hoyvík.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Óla Marner Christiansen, kl. 21 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Terja Nielsen og Helenu Petersen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Hilmar Bech. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, major Njál Djurhuus talar.
Týsdagin kl. 20 Heimaforbundið.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 16. februar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Føðingardagur og ársfundur verður 12. mars. Val verður av tveimum nevndarlimum. Øll uppskot eru vælkomin í postkassan í Tilhaldinum.
***Týsdagur 17. februar***
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 14.30 Aina Cederblom, Freydis Poulsen. Framsýning verður á Ólavsøku av barnamyndum frá 30'- og 40'unum og brúðarmyndum frá 30'-60'unum. **Allar myndir eru vælkomnar.**
***Mikudagur 18. februar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilmeld. tlf. 316491
kl. 15 Túrur – sjá skránna í bløðunum
kl. 17-21 Opið hús
***Hósdagur 19. februar***
kl. 10-11 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
***Fríggjadagur 20. februar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Fríggjadagin 20. februar***
Opið hús. Drekkamuður

*Gjørt verður vart við, at væl ber til at nýta Eysturoyarleiðina til Fløvan. Um spurningar eru, eru tit vælkomin at ringja 448051.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Opið er týs- og hósdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 310237.
www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 · fax 313609 og teldupostadr.: deaf_deaf.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

### GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 21. februar kunnu hjúnini Elly og Jóan Magnus Johannesen í Klaksvík halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Skálanum, har vælkomst verður frá kl. 18.



## UTTAN ÚR HEIMI

# Meiri ferð á ES-búskapin



*Gerhard Schrøder, Jacques Chirac og Tony Blair vilja hava meiri ferð á búsakapin í ES*

**Teir tríggir stóru í ES vilja hava ein "superráðharra", sum skal fáa meiri ferð á búskapin í samveldinum**

ES
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Gerhard Schrøder, kanslari, Jacques Chirac, forseti, og Tony Blair, forsætisráðharri, eru samdir um, at meiri ferð skal setast á búskapin í ES.

Á einum fundi í Berlin fyrradagin avtalaðu teir tríggir at fullføra samtyktina, sum varð gjørd á fundi í Portugal fyri fýra árum síðani, og sum hevði til endamáls at útvega ES oddasessin innan kunnleikabúskap.

– Alt ov ofta hava vit sæð, at vit nýta ikki okkara egnu gransking, og alt ov ofta verða forðingar lagdar menningini í vegin, siga teir tríggir í einum felags skrivi, sum nú er sent Bruxelles. Tí skal ein ráðharri, ein sonevndur superráðharri, setast til at skunda undir búskapin, siga teir.

Teir tríggir eru fyrr skuldsettir fyri at ganga egnar leiðir í ES-høpi, men í Berlin gjørdu teir greitt, at fundur teirra var bert ætlaður sum íblástur. Jacques Chirac vísti á, at tey trý londini eiga meiri enn helmingin av allari bruttotjóðarframleiðsluni í ES, og tí helt hann tað ikki vera so løgið, at tey hava felags áhugamál.

# Bilførararnir lógu og svóvu á bildekkinum

**Tilburðurin, tá danska ferjan "Stena Nautica" og eitt polskt farmaskip stoyttu saman mánadagin, kundi endað sum ein sonn vanlukka**

TRYGD
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Samanstoyturin í Kattegat kundi fingið syndarligar avleiðingar.

62 lastbilar vóru umborð á "Stena Nautica", tá polska farmaskipið "Joanna" brádliga rendi inn í síðuna á ferjuni, og teir flestu av teimum 62 bilførarunum lógu í bilunum á tí niðasta bildekkinum og svóvu, tá skipini stoyttu saman.

Tað er skiparin, sum skal syrgja fyri, at fólk ikki sleppa niður á bildekkið, meðan ferjur sigla ímillum havnir, men hesaferð sveik hesin parturin av trygdini. Kunningarstjórin hjá Stena Line, Joaki8m Kenndal, sigur við danska útvarpið, at tað var skeivt av lastbilaførarunum at leggja seg at sova niðri á bildekkinum, men at eftirlitið heldur ikki virkaði, sum tað átti.

Sambært danska bilførarafelagnum er tað vanligt, at lastbilaførararnir sova í lastbilunum, tá teir sigla við ferjum. Formaðurin, Per Petersen, sigur, at sambært bilførarunum er bilhúsið tað einasta staðið, har teir fáa frið at sova, meðan teir eru umborð á ferjunum, tí á nógvum ferjum noyðast teir at sova saman við fimm ella sjey øðrum, tí ongar smærri kahúttir eru.

Danski bilføraraformaðurin sigur kortini, at felagið fer at ráða sínum limum frá at sova á bildekkinum.

## Skerjingar í heilsuverki

Norsku sjúkrahúsini noyðast at spara nógvar pengar í ár og næsta ár fyri at halda játtaninar á fíggjarlógini. Sjúkrahúsini hava havt stórt hall, men politikararnir hava kravt, at hallið skal burtur innan árslok næsta ár.

Sambært einari kanning hjá tíðindastovuni NTB skulu sjúkrahúsini spara fýra milliardir norskar krónur hesi bæði árini. Tað fer at hava við sær, at fleiri hundrað starvsfólk verða uppsøgd, samstundis sum fólk noyðast at bíða nógv longri enn nú eftir at fáa viðgerð, sigur NTB. Harafturat verða íløgurnar í nýggja útgerð skerdar munandi.

Fyri tveimum árum síðani samtykti Stórtingið eina umfatandi umskipan innan heilsuverkið. Endamálið var at fáa meiri burtur úr heilsuverkinum og at fáa norðmenn at liva sunnari, men umskipanin hevur ikki virkað eftir ætlan.

## Minni útlát

Danska stjórnin hevur gjørt av, at Danmark skal skerja CO2-útlátið 15 prosent næsta ár fyri at avmarka broytingarnar í veðurlagnum á Jørðini.

Í ár senda donsku ídnaðarvirkini og orkuverkini 39 milliónir tons av drívhúsgassi út í luftina, men næsta ár skal nøgdin ikki fara upp um 33 milliónir tons, sigur stjórnin. Tað svarar til eina skerjing upp á 15 prosent og er í samsvari við avtaluna, sum varð gjørd í Kyoto í Japan fyri nøkrum árum síðani. Hans Christian Schmidt, umhvørvismálaráðharri, sigur við Politiken, at donsku virkini kunnu røkka málinum við at gera íløgur í nýggja tøkni ella við at skerja framleiðsluna.

Donsku orkuverkini eru alt annað enn fegin um avgerðina hjá stjórnini, tí tey bera ótta fyri, at avgerðin fer at raka tey nógv meinari enn tey dálkandi ídnaðarvirkini. Orkuverkini vísa eisini á, at avgerðin fer at kosta fleiri arbeiðspláss.

## Lækni drap sjúklingar

Løgreglan í Týsklandi hevur handtikið ein lækna, sum er undir illgruna fyri at hava beint fyri minst átta sjúklingum.

Ákæruvaldið sigur, at tann 53 ára gamla kvinnan breyt allar galdandi reglur, og at hon millum annað gav sjúklingum nógv meiri morfin, enn reglurnar áseta. Harafturat skal hon hava givið sjúklingunum ymsan heilivág saman við morfininum. Sjálv sigur kvinnan, at hon er ósek, men í samrøðu við eitt blað í oktober í fjør segði hon, at hon hevði fylgt fólki í deyðan, sum hon tók til.

Týska ákæruvaldið er í ferð við at kanna 76 tilburðir, har sjúklingar hjá læknanum doyðu, men fyribils er hon varðhaldsfongslað fyri átta tilburðir. Verður hon funnin sek í drápi, kann hon fáa lívlanga fongsulsrevsing. Verður hon dømd fyri at hava veitt deyðshjálp, verður revsingin væntandi linari. Sambært týskari lóg kunnu læknar, sum veita sjúklingum deyðshjálp, fáa upp í fimm ára fongsul.

## Tendraragass kravdi lív

Ein 16 ára gamal drongur í Ytrebygda í Vesturnoregi doyði mikukvøldið, eftir at hann hevði andað tendraragass í seg.

Bergens Tidende skrivar, at roynt varð at fáa lív í drongin, men til fánýtis. Nakrir vinmenn hjá dronginum greiddu løgregluni frá, hvat drongurin hevði gjørt, og á staðnum fann løgreglan bæði tendraran og útgerð, sum tann 16 ára gamli hevði nýtt til at anda gassið úr tendraranum í seg.

Fyri stuttum mistu tríggir ungdómar í norska býnum Larvik vitið, eftir at teir høvdu andað tendaragass í seg. Norska løgreglan heldur, at avvarðandi myndugleikar eiga at greiða ungdóminum frá, hvussu vandamikið tendraragassið er.